

MYND: SIGMAR MØRKØRE

Besta deildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	HB	4	3	1	0	8	4	+4	10
2	NSÍ	4	3	0	1	12	4	+8	9
3	B36	4	3	0	1	10	4	+6	9
4	Víkingur	4	2	2	0	11	4	+7	8
5	KÍ	4	2	0	2	6	7	-1	6
6	TB	4	1	1	2	2	3	-1	4
7	ÍF	4	1	1	2	5	12	-7	4
8	Skála	4	1	0	3	2	8	-6	3
9	B68	4	0	2	2	3	10	-7	2
10	AB	4	0	1	3	2	5	-3	1

1 = Heimasigur X = javnleikur 2 = Útisigur

KENDI TIPPARIN



Kendi tipparin hesaferð:

Jørgen Niclasen
Formaður í Fólkaflokkinum

	1	X	2
Skála - HB			2
ÍF - KÍ		X	
B36 - TB	1		
B68 - NSÍ			2
AB - KÍ			2

Seinast tippaði Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum
Hann hevði fýra rættar, men lat kanska hjartað vinna á skilinum, tá hann tippaði ein javnleik á Sevmýri. Jenis av Rana tippaði: NSÍ - ÍF 1 (6-1), TB - HB x (0-1), Víkingur - B68 1 (4-0), KÍ - Skála 1 (2-0) og B36 - AB 1 (2-1)

8. mai hetta árið vann Skála 4-3 á heimavølli ímóti HB. Tríggir, sum vóru á heimaliðnum ta ferðina, eru eisini á liðnum í ár – Pætur Dam Jacobsen, Jónhard Frederiksberg og Pauli G. Hansen. Einasti HB spælarin, sum var við í 2005, og sum aftur nú er á liðnum, er Rókur Jespersen.

Skála málverjin Andras Gango hevur gott mót:

– Vit vístu í øðrum umfari ímóti B36, at tað ber til hjá okkum á heimavølli at vinna ímóti favorittum. Síðani hava vit tapt í Runavík og í Klaksvík. Um vit skulu vinna úrtøku, so er neyðugt, at vit eru við frá fyrsta bríksli. Tað vóru vit ikki í Klaksvík. Vit vóna, at tað ímóti HB fer at eydnast frá dystarbyrjan at vísa sama hugburð, sum vit gjørdu í seinna hálvleiki í Klaksvík. Tíverri megnaðu vit ikki at fáa mál burtur úr fleiri spentum støðum. Tað vóna vit fer at eydnast ímóti HB, sigur Skála málverjin.

Í HB er lagið gott eftir stríðssigurin í Trongisvági:

– Tað kann væl vera, at gongdin á Skála í morgin fer at líkjast henni, sum var í Trongisvági. Vónandi fer tað at eydnast okkum at vera betri við bóltinum, enn vit vóru sunnudagin. Undanfarnu ferðirnar hevur spælið verið gott. Ímóti TB var tað góði hugburðurin og framúr verjuspæl, sum bóru sigurin við sær, staðfestir HB miðvallarin Tróndur Jensen.

Tað er kapping um plássini á HB liðnum. Jan C. Dam skal taka støðu til, um liðið skal vera tað sama, ella um onkur av higartil føstu monnunum, sum ikki vóru millum teir fyrstu ellivu í Trongisvági, aftur skulu fáa møguleikan. Teir eru Bartal Wardum, Teit Jacobsen, Christian R. Mouritsen og Ári Mohr Jónsson.

TB hevur bíðað í 24 ár

B36 - TB DAGFINN FORNÁ
sunnudagin kl. 15.00

Tað eru 24 ár síðani, at TB fór úr Gundadali við sigri ímóti B36. Síðani tá hava B36 og TB spælt tólv ferðir í høvuðsstaðnum. B36 hevur vunnið fulla úrtøku níggju ferðir, og tríggjar ferðir er tað endað javnt. Í fjør vann B36 3-0 og 2-1.

B36 venjarin Eyðun Klakstein heldur, at avrikini hjá hansara monnum higartil hava verið misjøvn:

– Vit hava níggju stig, og tað er á góðari leið, hóast vit iðra okkum um tapið á Skála. Avbjóðingin er, at vit ikki hava verið nóg støðugir. Í løtum hava vit víst meistaraspæl, meðan tað til aðrar tíðir ikki hevur verið at sæð, at hetta er meistaraliðið frá í fjør. Takið er at fáa allar spælararnar alla tíðina at vísa rætta hugburðin, sigur B36 venjarin.

TB úrtøkan úr fýra umførum er fýra stig og málmunurin 2-3. Tað sigur TB miðvallarin Salmundur Bech, at teir ikki eru nøgdir við:

– Málmunurin sigur, at tað er í álopinum, at vit hava trupulleikar. Tað sást væl ímóti HB, tá ið tað vóru ógvuliga nógvar støður í brotsteiginum hjá mótstøðuliðnum, ið kundu borið mál við sær. Har er nógv at arbeiða við hjá okkum. Vit vóna og trúgva uppá, at tað skal eydnast ímóti B36, sigur TB miðvallarin.



MYND: ÁLVUR HARALDSEN

Víkingur ikki góð minni av Argjum

AB - VÍKINGUR RÚNI GAARDBO
sunnudagin kl. 17.15

Síðani Trygvi Mortensen tók við sum venjari á Argjum hevur tað ikki eydnast at vinna fulla úrtøku. Einasta stigið higartil varð vunnið í 1-1 javnleikinum í fyrsta umfari ímóti B68.

Trygvi Mortensen hevur ikki mist mótið um, at tað fer at venda:

– Vit hava spælt tríggjar torførar dystir á útivølli, og talan hevur ikki verið um stórtap. Nú eiga vit aftur heimavøll. Ímóti B36 sóu vit aftur, at tað gongur illa hjá okkum at spæla okkum til heilt upplagdar málmøguleikar. Ímóti B36 vóru vit betri á síðsta triðinginum, enn vit áður hava verið, og tað telur eisini rætta vegin, at spælararnir vístu góðan hugburð, sigur AB venjarin.

Í fjør endaði tað tvær ferðir málleyst á Argjum millum AB og Víking. Mongu javnleikirnir vóru orsøk til, at Víkingur ikki megnaði at blanda seg í FM stríðið.

Jón Krosslá Poulsen heldur, at tað sær gott út hjá Víkingi eftir 4-0 sigurin á B68:

– Í fyrstu umførunum var tað striltið í fyrra hálvleiki. Ímóti B68 fótaðu vit okkum eftir hálvan tíma. Nú ræður um hjá okkum at vera klárir frá fyrsta bríksli, sigur nýggi Víkinga álopsspælarin Jón Krosslá Poulsen.

JOANNES@SOSIALURIN.FO

KÍ

Ivasamir:
Hjalgrím Elttør (knæið)
og Mayowa Alli (fótliður)

ÍF

Við aftur:
Alex José dos Santos (klárur aftur eftir at hava ligið sjúkur)
Ikki við: Dánjal Pauli Højgaard (langtíðarskaddir) og Poul N. Mikkelsen (langtíðarskaddir)
Ivasamur: Jan Ó. Ellingsgaard (vøddaskaða í lærinum)

AB

Við aftur:
Sørin Samuelsen (eftir leikbann),
Árni Guldborg Nielsen (ikki loyvi at spæla ímóti B36)
Ikki við:
Andri Freyr Bjørnsson (knæið) og Gert Drangastein (slitið hælsinuna, langtíðarskaddur)

TB

Ikki við: Rógvi Joensen (uttanlands í lestrarørindum)
Ivasamur: Absalon Eliasen (júst byrjaður at venja aftur)

SKÁLA

Allir mans tøkir